# Johan er fluttur upp

**Møguleikin hjá Jón Róa Jacobsen og Frem kámaðist, tá ið størsti kappingarneytin hjá teimum fekk fult í næstsíðsta umfarinum**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Í hvussu so er ein útiseti fer næsta kappingarár at stríðast í superliguni. Talan er um Johan Byrial Hansen, sum er í verjuni hjá Horsens. Sunnudagin varð greitt, at Horsens hevði tryggjað sær annað uppflytingarplássið. Tað kom til høldar, tá ið teir á Eysturbrúgv vunnu 2-0 á Skjold. Bæði málini vórðu skorað innanfyri teir seinastu tíggju minuttirnar.

Fagnaðurin í Horsens leguni var ógvuliga stórur, og tað var ikki so undarligt. Mesta partin av kappingini vóru teir klárt á fremsta plássinum. Men - á sama hátt sum í fjør - so fingu teir gummibein, tá ið uppflytingin endaliga skuldi tryggjast. Hesar seinastu dagarnar gekk tó aftur undan. Fyrst vunnu teir hóskvøldið 2-1 í útsetta heimadystinum ímóti Frem, og so staðfestu teir uppflytingina sunnudagin, tá ið teir vóru í høvuðsstaðnum.



*Við einum 2-0 sigri á Skjold hava Horsens og Johan Byrial Hansen tryggjað sær uppflyting til superliguna*

Í seksti árunum var Horsens í femstu deildini. Teir vóru nevndir Den gule fare fra Horsens, men nógvu tey seinastu árini hava teir ikki verið serliga vandamiklir.

Spurningurin er nú, um sunnasti parturin av Danmark skal fáa enn eitt umboð í bestu deildini. SønderjyskE, sum hevur heimavøll í Haderslev, er á næstfremsta plássinum. Teir eru tvey stig frammanfyri Frem, og teir hava væl betri málmun.

Fyritreytirnar hjá Frem eru einki serligar, eftir at teir sunnudagin vunnu 4-1 á B93. Jón Rói Jacobsen var á vøllinum allar 90 minuttirnar. Samstundis vann SønderjyskE 2-0 í Næstved. Í síðsta umfarinum skal Frem spæla torføran útidyst í Køge, meðan SønerjyskE skal spæla á heimavølli ímóti Fredericia.

Fremad Amager vann sunnudagin 3-1 á heimavølli ímóti Brønshøj. Andrew av Fløtum var so mikið viðtikin eftir landsliðsferðina í Føroyum, at hann var ikki førur fyri at spæla við í síðsta heimadystinum í hesum kappingarárinum.

# Tað gongur illa hjá KR

**Tapið í oyggjunum sunnudagin var tað triðja á rað hjá Rógva Jacobsen og liðfeløgunum, sum eftir fimm umfør eru langt frá fremsta plássinum**

ÍSLAND
*Jóannes Hansen*

Tað gongur einki serligt hjá KR, sum hevur Rógva Jacobsen á liðnum. Fimta umfarið var á skránni sunnudagin. KR spældi í oyggjunum ímóti ÍBV, og tað var soltið hjá Rógva Jacobsen, nú hann fyrstu ferð var í Vestmannaoyggjunum.

ÍBV hevði ikki vunnið í fýra teimum fyrstu umførunum. KR hevði ikki vunnið í oyggjunum í átta ár. Hesa ferð var tað ÍBV, sum vann. ÍBV var frammanfyri 2-0, áðrenn teir gjørdu sjálvmál og fingu ein mann vístan av vøllinum.

Á odda í Landsbankadeildini eru FH og Valur, sum eftir fimm tey fyrstu umførini bæði hava fult stigatal. Tey eru harvið níggju stig frammanfyri KR, sum hevur tapt tríggjar tær síðstu ferðirnar.

Hesa ferð vann FH 3-1 á útivølli ímóti Þrótti, meðan Valur var í Keflavík, har teir smurdu heimaliðið av 5-1. Fylkir, sum er á triðja plássinum við níggju stigum, vann 2-1 á heimavølli ímóti Grindavík. Saman við Fylkir hava Fram og ÍA, sum vóru partar av málleysum javnleiki, sjey stig.

## Hans Fróði í essinum

Í næstbestu deildini eru Breiðablik og Hans Fróði Hansen komin væl frá fyrstu umførunum. Hesa ferð var Breiðablik á Ólafsfirði og spældi ímóti Víkingi, og tað hilnaðist væl. Breiðablik vann 3-0, eftir at tað í steðginum hevði verið málleyst.

Hans Fróði Hansen var kosin dagsins maður. Hann var í miðverjuni, og hann átti sín stóra lut í, at Breiðablik fekk hol á, tá ið tað restaðu sjey minuttir. Eftir skotroynd frá Hans Fróða varð ein av monnunum hjá Víkingi rikin av vøllinum, eftir at hann á mállinjuni hevði nýtt hondina at verja við. Breiðablik umsetti brotssparkið til mál, og síðstu minuttirnar skoraðu teir tvær ferðir afturat.

# Brøndby er í serflokki

**Nú er tað greitt, at Herfølge flytir niður saman við Randers, sum fyri einum ári síðani vann sær pláss í fremstu deildini**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Fyri 10. ferð hevur Brøndby vunnið DM í fótbólti. Brøndby hevur verið oddalið mest sum alt kappingarárið, og leygardagin staðfestu teir ógvuliga sannførandi meistaraskapin. Brøndby hevði vitjan av Herfølge, sum leingi hevur stríðst fyri at sleppa undan niðurflytingini.

Nýmótans stadion í Brøndby var á tremur við áskoðarum, og teir fingu tað fyri atgongugjaldið, sum teir høvdu vónað og roknað við. Brøndby spældi mótstøðuliðið sundur og saman. Teir vunnu 7-0, og teir høvdu møguleikar at skjóta uppaftur fleiri mál.

FCK vann sunnudagin 1-0 í Parkini ímóti Esbjerg. Álvaro Santos skoraði sigursmálið longu í 3. minutti. Todi Jónsson tykist vera púra avskrivaður av Hans Backe. Hóast fleiri spælarar ikki vóru førir fyri at spæla, so var Todi ikki ímillum teir sekstan, sum vóru úttiknir.

FCK er framvegis best fyri í kappingini um silvurkrónurnar. Tvey umfør eru eftir, og mikukvøldið verður rætuliga avgerandi avbjóðing hjá FCK á skránni. Tá skulu teir spæla í Aalborg ímóti AaB, sum er tað felagið, ið hevur staðið seg best síðani vetrarsteðgin. AaB er á fjórða plássinum við 52 stigum. Esbjerg hevur 47 stig og er nummar fimm. Esbjerg skal mikukvøldið spæla á heimavølli ímóti FCM, sum í løtuni er nummar trý. Teir hava 53 stig og eru tvey stig aftanfyri FCK.

Sunnudagin sendi FCM Randers niður í næstbestu deildina. Í steðginum var tað málleyst í Randers, men so skoraði FCM tríggjar ferðir. Randers flutti upp í bestu deildina fyri einum ári síðani. Ofta verður sagt, og úrslitini vísa, at tað er nógv í tí, at í hvussu so er annað felagið, sum flytir upp, flytir niður aftur árið eftir. Soleiðis er støðan hjá Randers í løtuni.

Fyri einum ári síðani flutti Silkeborg upp. Í vetrarsteðginum sá einki serligt út hjá Silkeborg, men tað hevur hilnast væl hjá teimum í vár. Sunnudagin megnaðu teir 1-1 ímóti AGF, og teir eru langt frá øllum vanda fyri at flyta niður.

OB var í vetrarsteðginum millum tey bestu. Síðani hevur gingið syndarliga illa hjá teimum. Sunnudagin taptu teir á heimavølli 2-1 ímóti væl upplagda AaB, sum var frammanfyri 2-0, áðrenn tað síðstu lítlu løtuna gjørdist spennandi.

FC Nordsjælland og Herfølge hava kappast fyri at sleppa undan seinna niðurflytingarplássinum. Sunnudagin vann FCN 2-1 í Viborg. Tá ið Herfølge leygardagin hevði lagt rygg til 7-0 tap í Brøndby er tað nú greitt, at tað verða Randers og Herfølge, sum fara at flyta niður. 33. og síðsta umfarið í superliguni verður nú sunnudagin.

**Danska superligan**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Brøndby (S) | 31 | 18 - 9 - 4 | 57 | 22 | 35 | 63 |
| 2 FCK (M) | 31 | 16 - 7 - 8 | 51 | 37 | 14 | 55 |
| 3 FCM | 31 | 16 - 5 - 10 | 45 | 39 | 6 | 53 |
| 4 AaB | 31 | 15 - 7 - 9 | 57 | 40 | 17 | 52 |
| 5 Esbjerg | 31 | 13 - 8 - 10 | 59 | 45 | 14 | 47 |
| 6 Viborg | 31 | 12 - 9 - 10 | 39 | 41 | -2 | 45 |
| 7 OB | 31 | 11 - 9 - 11 | 55 | 39 | 16 | 42 |
| 8 Silkeborg | 31 | 11 - 8 - 12 | 44 | 48 | -4 | 41 |
| 9 AGF | 31 | 11 - 6 - 14 | 46 | 48 | -2 | 39 |
| 10 FC Nordsj. | 31 | 8 - 6 - 17 | 35 | 54 | -19 | 30 |
| 11 Herfølge | 31 | 6 - 6 - 19 | 26 | 67 | -41 | 24 |
| 12 Randers FC | 31 | 5 - 8 - 18 | 27 | 60 | -33 | 23 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK)

**Danska 1. deild**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 AC Horsens | 29 | 19 - 6 - 4 | 50 | 21 | 29 | 63 |
| 2 Sønderjyske E | 29 | 18 - 7 - 4 | 71 | 30 | 41 | 61 |
| 3 Frem | 29 | 17 - 8 - 4 | 61 | 26 | 35 | 59 |
| 4 Køge | 29 | 15 - 8 - 6 | 63 | 34 | 29 | 53 |
| 5 HIK | 29 | 12 - 10- 7 | 54 | 37 | 17 | 46 |
| 6 Vejle | 29 | 13 - 7 - 9 | 57 | 50 | 7 | 46 |
| 7 Skjold | 29 | 14 - 4 - 11 | 44 | 43 | 1 | 46 |
| 8 Fremad Am. | 29 | 11 - 10- 8 | 48 | 38 | 10 | 43 |
| 9 Fredericia | 29 | 10 - 8 - 11 | 47 | 46 | 1 | 38 |
| 10 AB | 29 | 10 - 5 - 14 | 48 | 50 | -2 | 35 |
| 11 NFA | 29 | 9 - 6 - 14 | 47 | 58 | -11 | 33 |
| 12 Ølstykke | 29 | 8 - 5 - 16 | 35 | 64 | -29 | 29 |
| 13 Brønshøj | 29 | 7 - 7 - 15 | 44 | 64 | -20 | 28 |
| 14 Dalum | 29 | 8 - 3 - 18 | 46 | 77 | -31 | 27 |
| 15 Næstved | 29 | 6 - 2 - 21 | 29 | 68 | -39 | 20 |
| 16 B 93 | 29 | 3 - 8 - 18 | 39 | 77 | -38 | 17 |

Føroyskir leikarar: Gunnar Nielsen Jón Rói Jacobsen, Jónas Þór Næs (Frem), Andrew av Fløtum (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

**Danska 2. deild**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kolding FC | 29 | 22 - 0 - 7 | 60 | 29 | 31 | 66 |
| 2 Brabrand | 29 | 18 - 4 - 7 | 57 | 29 | 28 | 58 |
| 3 Holbæk | 29 | 16 - 7 - 6 | 61 | 35 | 26 | 55 |
| 4 Lyngby | 28 | 17 - 3 - 8 | 64 | 30 | 34 | 54 |
| 5 Glostrup | 28 | 16 - 4 - 8 | 60 | 40 | 20 | 52 |
| 6 Slagelse | 29 | 13 - 9 - 7 | 52 | 34 | 18 | 48 |
| 7 Næsby | 29 | 13 - 5 - 11 | 43 | 35 | 8 | 44 |
| 8 Jetsmark | 29 | 11 - 7 - 11 | 52 | 49 | 3 | 40 |
| 9 Aarhus Frem. | 29 | 11 - 5 - 13 | 45 | 40 | 5 | 38 |
| 10 B 1913 | 29 | 9 - 9 - 11 | 41 | 47 | -6 | 36 |
| 11 B 1909 | 29 | 8 - 8 - 13 | 28 | 44 | -16 | 32 |
| 12 FC Roskilde | 29 | 10 - 1 - 18 | 33 | 63 | -30 | 31 |
| 13 Hjørring | 29 | 7 - 9 - 13 | 37 | 57 | -20 | 30 |
| 14 Kalundborg | 29 | 6 - 6 - 17 | 38 | 60 | -22 | 24 |
| 15 Holstebro | 29 | 6 - 4 - 19 | 32 | 65 | -33 | 22 |
| 16 Værløse | 29 | 6 - 3 - 20 | 27 | 73 | -46 | 21 |

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby), John Petersen (Holstebro)